## Døtur gera sum pápin

Amerikonsk hagtøl vísa, at altsamt fleiri gentur ella ungar kvinnur velja sær somu útbúgving ella sama arbeiði sum pápin.Gongdin er heilt týðilig, tí tey seinastu umleið 30 árini er talið á kvinnum, sum velja sama arbeiði sum pápin, trífaldað, skrivar Ritzau. Orsøkin er sambært granskarunum, at fleiri kvinnur eru komnar út á arbeiðsmarknaðin, samstundis sum tann gamla myndin av kvinnuni heima við hús og manninum úti í arbeiðslívinum er ein farin tíð. Og so kunnu pápapnir sjálvandi ávirka døturnar, tá teir skulu velja sær lívsleið.



## Falsaðar myndir

Í Avstralia hava tvey bløð biðið tingkvinnuna Pauline Hanson um umbering fyri at hava prentað myndir av einari naknari kvinnu við tílvísing um, at myndirnar vóru av tingkvinnuni. Hetta vísti seg ikki at vera so, og nú hava blaðleiðslurnar biðið so staðiliga um umbering fyri mistakið. Myndirnar av teirri naknu kvinnuni stóðu í Sidney-blaðnum Sunday Telegraph og Melbourne-blaðnum Sunday Herald, og at tað var ein fyrrverandi unnusti hjá Pauline Hanson, sum hevði tikið tær. Men myndirnar vóru ikki av henni, og teir báðir blaðstjórarnir hava nú biðið um umbering.

# Vit skulu rinda skatt við gleði



*Arnold Hjelm Nielsen, stjóri í Taks*

**Taks brúkar hundratúsundatals krónur til marknaðarføring fyri at fáa føroyingar at rinda skatt við gleði. – Skattamyndugleikarnir skulu signalera, at vit upplýsa og hjálpa, heldur enn at píska fólk, sigur Arnold Hjelm Nielsen, stjóri í Taks**

BRÚKARMÁL
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Tað er tín skattakróna, sum byggir land. Soleiðis ljóðar nýggjasta herrópið hjá TAKS.

Í blaðlýsingum, á internetinum og í sjónvarpslýsingum verða vit sannførd um, at tað er tín skattakróna, sum byggir land. Onkuntíð við einari smágentu við brotnum armi, ella við einum pensionisti, sum heldur í einum stavi.

Men, umframt at tín skattakróna verður brúkt til at byggja land, verður hon eisini brúkt til at marknaðarføra almenna stovnin, sum krevur skattin inn. Og her er tað, at vit spyrja: Hví brúkar almenni innkrevjingarstovnurin TAKS pening til marknaðarføring um, hvar skattakrónurnar verða brúktar til? Er hetta ikki uppgávan hjá politikarunum? Hvat er endamálið, og hvat hevur tað kostað?

Ikki minst, tá havt verður í huga, at fyri bert einum ári síðani ella so skifti sami stovnur samleika, og brúkti nógvan pening til at marknaðarføra nýggja samleikan. Bæði í bløðum, á netinum, í sjónvarpslýsingum og við lutum av alskyns slag.

Vanliga seta vit hetta við marknaðarføring í sambandi við eina vøru, tænastu ella eina boðskap, sum skal seljast. Ofta tí fyritøkur liggja í kapping við hvørja aðra. Men hevur Taks eina vøru, tænastu ella ein boðskap, sum skal seljast?

### Opinleiki og góð tænasta

Í samrøðu við Sosialin sigur stjórin í Taks, Arnold Hjelm Nielsen, at stovnurin í nógv ár hevur mint á sjálvuppgávuna í lýsingarherferðum. At stovnurin seinastu fáu árini eisini hevur brúkt lýsingar, sum hava til endamáls at upplýsa um sjálvan stovnin, og uppgávurnar hann røkir, er nakað nýtt.

Fremsta missiónin hjá Taks er at tryggja landskassanum skatta- og avgjaldsinntøkur. Og so skal stovunurin verða eyðkendur við at veita góða tænastu.

- Vit hava ein ”mál- og avrikssáttmála” við Fíggjarmálaráðið, har tænasta og góðska skal eru í hásæti. Tí vilja vit bøta um tunga samleikan hjá stovninum og um hugburðin hjá fólki í sambandi við toll og skatt sum heild, sigur Arnold Hjelm Nielsen við Sosialin.

Hann vísir á, at herferðin ”Tað er tín skattakróna, sum byggir land” talar til samvitskuna hjá fólki, og upplýsir fólk um, hvar pengarnar hjá skattaborgarunum fara. Beint uppundir evstamark fyri sjálvuppgávuna tann 15. mars, varð herrópið útbygt við einari áminning um sjálvuppgávuna.

### Frá lúrki til lógvatak

Í missiónini hjá Taks verður sagt, at stovurin fyrst og fremst skal tryggja landskassanum skatta- og avgjaldsinntøkur. Her skal eyðkennið vera góða tænasta. Eisini hevur stovnurin tvey fokusøki: at Taks skal vera sjónligt og virkið. Millum annað skal ”tænastustøðið hækka”, tað skal ”handlast proaktivt” og tað skal vera ”lætt at gera rætt”.

Ein partur av marknaðarføringini skal sostatt ávirka hugburðin hjá okkum mótvegis Taks – hjúkla um samleikan hjá stovninum, á ein positivan hátt.

- Vit hava onkuntíð rópt nýggja strategiina”Frá lúrki til lógvatak”, ella ”Vit skulu ikki píska, men hjálpa”, sigur Arnold Hjelm Nielsen. Og hann greiðir frá um eina eldri lýsingarherferð í sambandi við sjálvuppgávuna, har móttakarin varð hóttur við 5000 krónur í bót, um hann lat inn ov seint.

- Vit vilja nógv heldur signalera, at vit ynskja eitt opið og positivt samskifti við brúkaran. Tí er tað eisini natúrligt at upplýsa um, hvat pengarnir verða brúktir til, sigur hann.




### Nýggjan samleika

Sum sagt fekk stovnurin Toll og Skatt nýggjan samleika í fjør. Í tí sambandi fekk hann nýggja heimasíðu og broytti navnið til TAKS. Hendan broyting kostaði umleið 300.000 krónur við reklamulutum, lýsingarherferð, heimasíðu og tiltaki í Norðurlandahúsinum.

Lýsingarherferðin ”Tað er tín skattakróna, sum byggir land” hevur kostað umleið 120.000 krónur, og herferðin upp undir sjálvuppgávuna í fjør kostaði umleið 100.000 krónur.

### Effektivari tænastur

Alt fleiri tænastur hjá Taks verða sjálvvirknar, soleiðis at brúkarin sjálvur kann avgreiða síni viðurskifti. Sambært stjóranum fer ein partur av marknaðarføringini eisini til at upplýsa um hesar nýggju e-tænastur. Harumframt hevur stovnurin spart nógvan pening í porto seinastu árini. Eitt nú verður kontoavritið, sum fólk fingu sendandi við postinum áðrenn sjálvuppgávuna, nú prenta beint á skattauppgerðina. Eisini fylgja upplýsingarnir, sum fyrr vóru sendir fólki í einum bóklingi, nú við skattauppgerðini.

- Her hava vit spart einar 300.000 krónur í porto. Saman við tí, og so at fólk í størri mun avgreiða síni viðurskifti yvir e-skiparnir, spara vit nógvan pening og leysgeva arbeiðsmegi, til dømis til eftirlit og innheinting, sigur Arnold Hjelm Nielsen.

Men nú hava vit so fingið eina frágreiðing upp á, hví Taks brúkar pening til at fortelja okkum, at ”Tað er tín skattakróna, sum byggir land”: Vit skulu rinda skatt við gleði!